

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 02 - 2013

# Atlantic Petroleum 15 ára føðingardag

Í dag eru 15 ár síðani føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum varð stovnað. Atlantic Petroleum er komið langt síðan felagið varð stovnað hin 11. februar 1998. Útgangsstøðið var at verða við til leiting eftir olju í Føroyum, og felagið var við í fyrsta føroyska leitloyvinum nummar 001 saman við Amerada Hess, BG og DONG. Eitt stórt stig fyri Atlantic Petroleum var avgerðin um at fara í bretskt øki. Í 2002 luttók felagið í síni fyrstu boring bretsku megin markið, og í 2003 keypti Atlantic Petroleum seg ínn í Chestnut og Ettrick oljuleiðirnar. Atlantic Petroleum gjørdist oljuframleiðari í 2008 og hevur felagið framleitt 3.5 mió tunnur síðani tá. Nú er Atlantic Petroleum virkið í 5 londum við einum leitiskrá uppá 4 5 brunnar árliga. Felagið hevur 38 loyvi í Føroyum, Bretlandi, Noregi, Hollandi og Írlandi. Atlantic Petroleum gjørdi av at fara í norskan sjógv í 2012, og beint fyri jól í 2012 almannakunngjørdi Atlantic Petroleum, at felagið hevur keypt seg inn í tvey oljufund í bretskum sjógvi, Orlando og Kells. Ætlanin er, at hesar leiðir skulu koma í framleiðslu í ávikavist 2014 og 2015. AP hevur skrivstovur í Tórshavn, London og Bergen, og tilsamans starvast umleið 30 fólk hjá felagnum. Tey fólk, sum vóru so framsíggin at leggja lunnar undir Atlantic Petroleum fyri 15 árum síðani, hava gjørt, at vit í Føroyum í dag hava eitt norðureuropeiskt oljufelag, sum er í stórari menning við nógvum spennandi møguleikum í framtíðini. Vit hava útbyggingar fyri framman, sum væntast at økja um framleiðslu felagsins uppá stutt sikt, og vit koma at luttaka í mongum spennandi leitibrunnum tey næstu árini, sum kunnu geva framleiðslu uppá longri sikt," sigur Ben Arabo, stjóri í felagnum.